

*Sørvágs Kommuna ætlar at byggja nýggja dagstovn Uppi á Mýrum, fremst á myndini*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Sørvingar fyrireika barnagarð

**Sørvágs Kommuna arbeiðir við at fáa nýggjan barnagarð í bygdini. Ætlandi skal nýggi dagstovnurin kunna hýsa 100 børnum, sigur borgarstjórin**

BARNAANSING
*Edvard Joensen*

**Sørvagi:** Barnaansingartilboðini í Sørvági fara at økjast munandi nakað skjótt, gongur tað, sum bygdarráðið ætlar. Ein nýggjur dagstovnur við plássi til 100 børn verður fyrireikaður.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, sigur, at tey hava tekningar klárar, og at nú verður arbeitt við at fáa grundsykkið til nýggja dagstovnin, sum ætlanin er at byggja niðan fyri fyrstu húsini Uppi á Mýrum. Samráðingar eru við eigararnar av lendinum, har ætlanin er at byggja dagstovnin.

Barnagarður er, sum er, í Sørvági. Talan er um eini umbygd, gomul sethús, sum hýsa 31 børnum, sigur borgarstjórin. Tann loysnin er bara næstbest og als ikki tíðarhóskandi, sigur hann. Umframt er eisini dagrøktarskipan í Sørvági. Men sum er nøkta tær báðar skipaninar ikki tørvin á barnaansing í Sørvági, sigur Eivin Jacobsen.

– Sjálvandi kundu vit bara sett eina dagrøktarmammu aftur at í starv, so hvørt, sum tørvurin er har. Men tað er eingin loysn, sigur hann. Tí hava vit gjørt av at byggja hendan nýggja dagstovnin.

Eivin Jacobsen sigur, at nýggi dagstovnurin hjá Sørvágs Kommunu væntandi fer at kosta einar átta - níggju milliónir krónur.

– Tað eru sjálvandi nógvir pengar, men vit hava ásannað tørvin og valt at fara undir hetta nú, sigur hann.



*Soleiðis hugsar arkitekturin sær, at nýggi dagstovnuni skal síggja út uttan*

*Mynd West Tech*

# Jólagáva til Barnaheimið



*Brynjar Viggosson, stjóri á Eimskip í Føroyum - í miðuni - var mánadagin saman við Joeli undir Leitinum og handaði varaleiðaranum á Føroya Barnaheimi, Hallbjørg Lamhauge, ein kekk upp á kr. 10.000,-*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroya Barnaheim fekk mánadagin handaðan ein kekk áljóðandi 10.000,- krónur frá Eimskip**

JÓLAGÁVA

Føroya Barnaheim fekk ein góða jólagávu frá skipafelagnum Eimskip mánadagin. Ein kekk upp á 10.000,- krónur.

Joel undir Leitinum, sum saman við stóranum á Eimskip í Føroyum, Brynjari Vigosson, var á Barnaheiminum við kekkinum, sigur, at Eimksip í ár hevur valt at lata ta upphæddina, felagið annars plagar at nýta til jólakort og slíkar heilsur, til eitt vælgerandi endamál.

Gávan varð latin Føroya Barnaheimi sum eitt herðaklapp fyri ta góða arbeiðið, Barnaheimið ger, sigur Joel undir Leitinum.

Tað var Hallbjørg Lamhauge, varaleiðari á Barnaheiminum, sum tók í móti gávuni. Leiðarin, Finnur Helmsdal, fekk ikki verið til staðar vegna sjúku, sigur Joel undir Leitinum.

# Nógv ferð og bardagi

**Vikuskiftið hevur verið sum vanligt hjá løgregluni. Onkur koyrdi ov skjótt, onkur annar var ov brásintur,og onkur hevði ov langar fingrar og kendi ikki mun á mínum og tínum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

Løgreglan í Havn letur at hampiliga friðaligum vikuskifti. Ov nógv ferð, harðskapur og innbrot standa í samdøgurðsfrágreiðingini hjá vakthavandi.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur frá, at um vikuskiftið var onkur, sum koyrdi alt ov skjótt í mun til tað, loyvt er.

– Og tað er ikki so stuttligt hjá teimum aftaná, heldur politisturin.

Okkurt smávegis ferðsluóhapp hevur eisini verið. Eitt var á vegamótinum Sundsvegur/Norðari Ringvegur, har tað meira enn so kemur fyri, at slík henda. Eitt prutl og ein bilur stoyttu saman, sigur løgreglan. Okkurt smátt av materiellum skaða hendi, men eingin mansskaði.

Kavi legðist um vikuskiftið, men tað hevur ikki elvt til nakað óhapp, sum tey vita at siga um á løgreglustøðini í Havn.

Summi fólk hava hatta har við at missa tamarhaldið á sær sjálvum í dansi ella kanska serliga aftan á dans. Soleiðis var eisini tíðliga sunnumorgunin, tá ein maður sló ein annan í høvdið við eini fløsku. Hetta hendi í Klubbagarðinum.

Fráboðanin til løgregluna segði, at maðurin bløddi illa, og hann varð tí fluttur á Landssjúkrahúsið. Men tað vísti seg ikki at vera so álvarsligt kortini, og neyðugt varð ikki at seyma nakað, sigur løgreglan.

Maðurin, sum sló við fløskuni, varð stutt eftir handtikin av løgregluni.

Innbrot varð leygarnáttina í handlinum Damor á Argjum. Har var radio- og tónleikaútgerð fyri einar 25.000 krónur stolin. Eisini vórðu umleið 6.000,- krónur í reiðum peningi tiknar, eins og ein kekkur, sum var í húsinum, eisini varð tikin.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at gerningsmenninir eru farnir inn gjøgnum eina garaguhurð og haðani inn í sjálvan handilin, har vørurnar og peningurin eru tikin.

Eitt vitni boðaði løgregluni frá, at hava sæð tveir bilar í økinum um hesa tíðina, og út frá teirri frágreiðingini tók løgreglan leygardagin tríggjar mans. Ein 18 ára gamlan og tveir 19 ára gamlar.

Húsarannsókn varð gjørd, og har vóru allar vørurnar, sum tiknar vórðu úr handlinum, funnar. Eisini fann løgreglan allar pengarnar. Sjálvt kekkurin er afturkomin, sigur Bergleif Brimvík.

Menninir vóru eftir avhoyringar, har teir játtaðu seg sekar, leyslatnir og bíðað nú eftir at koma fyri rættin.






# Signar sigur ikki nei upp á forhond

**Týskvøldið verður annar og triðji uppstillingarfundur hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni. Og enn eru bæði Signar á Brúnni og Hans Tausen Olsen í uppskoti**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Átta nøvn skulu standa á endaliga uppstillingarlistanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni. Í løtuni eru níggju nøvn í uppskoti. Teirra millum eru Signar á Brúnni og Hans Tausen Olsen.

Tórbjørn Jacobsen er eisini millum tey níggju nøvnini, men hann hevur sagt, at um Hans Tausen Olsen verður á endaliga listanum, so vil hann ikki vera við.

Tórbjørn Jacobsen hevur brúkt sum frágreiðing, at tað ikki er vanligt at hava tveir persónar úr somu kommunu. Men hesum vísir Signar á Brúnni aftur:

- Tað er ikki nøkur siðvenja hjá okkum um, at fleiri úr einari kommunu ikki kunnu vera á listanum. Við seinasta val stillaðu tvey upp úr Fuglafirði og áður hava eisini tvey valevni verið úr Runavík, sigur Signar á Brúnni.



*Hans Tausen Olsen dugur ikki at síggja, at tað hevði gjørt nakað, um bæði hann og Tórbjørn Jacobsen stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoynni*

## Tórbjørn broytti siðvenjuna

Eisini Hans Tausen Olsen vísur aftur, at tað er siðvenja at bara ein skal vera úr somu kommunu. Tvørturímóti sigur Hans Tausen Olsen, at tað júst var Tórbjørn Jacobsen, sum í 1998 breyt ta siðvenjuna.

- Í 1998 var eg uppstillaður, sum tingmaður og tá kom júst Tórbjørn Jacobsen eisini á listan við tí grundgeving, at tað var gott við kapping á listanum, sigur Hans Tausen Olsen.

Tórbjørn Jacobsen hevur onga viðmerking til hesa greinina.

Hans Tausen Olsen dugur heldur ikki at síggja, at tað hevði havt nakran týdning fyri atkvøðutalið hjá teimum báðum, um báðir stilláðu upp.

- Vit liggja ikki eftir somu atkvøðum. Eg havi higartil fingið umleið 150 atkvøður og tað kann gott vera at onkur av teimum ikki hevði komið til Tjóðveldisflokkin, um eg ikki stillaði upp, sigur Hans Tausen Olsen.

Tórbjørn Jacobsen fekk við seinasta løgtingsval 448 atkvøður.

## Helst fyrimunur við fleiri

Signar á Brúnni hugsar seg leingi um, tá hann verður spurdur um, tað hevði verið ein fyrimunur fyri Tjóðveldisflokkin um bæði Hans Tausen Olsen og Tórbjørn Jacobsen stillaðu upp.

- Tað er trupult at siga. Møguliga hevði tað givið nakrar eykaatkvøður. Jú tað hevði helst verið ein fyrimunur, sigur Signar á Brúnni.

Signar á Brúnni hevur verið sera atfinningarsamur móti Tjóðveldisflokkinum, síðani hann noyddist at leggja frá sær sum landsstýrismaður í mentamálum og ikki fekk starvið aftur, eftir at ein kanningarstjóri fríkendi Signar á Brúnni.

Tórbjørn Jacobsen var varamaður hjá Signari á Brúnni, og tá Signar á Brúnni kom aftur í Tingið á várið 2000 gjørdist Tórbjørn Jacobsen landsstýrismaður í mentamálum.

Seinasta løgtingsval stilláðu hvørki Signar á Brúnni ella Hans Tausen Olsen upp. Tá gjørdist Tórbjørn Jacobsen stóri atkvøðuslúkarin. Til valið 1998 var Tórbjørn Jacobsen næstur á listanum við 232 atkvøðum móti 286 til Signar á Brúnni.

**Fakta**

Valúrslit hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni 1998 og 2001

**2001**

| | | |
|---|---|---|
| **E. Tjóðveldisflokkurin** | **1383** | |
| Listin | 187 | |
| Jóannes K Eliassen | 113 | |
| Andrea Eldevig | 53 | |
| Hallur Ellingsgaard | 17 | |
| Hallbjørg A. Hansen | 208 | 2 |
| Suni í Hjøllum | 124 | |
| Torbjørn Jacobsen | 448 | 1 |
| Olaf í Garði Joensen | 157 | 3 |
| Birgir Nónsgjógv | 76 | |

**1998**

| | | |
|---|---|---|
| **E. Tjóðveldisflokkurin** | **1177** | |
| Listin | 122 | |
| Signar á Brúnni | 286 | 1 |
| Jóannes Elisasen | 103 | |
| Hallur Ellingsgaard | 17 | |
| Súni í Hjøllum | 115 | |
| Tórbjørn Jacobsen | 232 | 2 |
| Olaf í Garði Joensen | 106 | |
| Hans Tausen Olsen | 145 | 3 |
| Rasmus Skorðheim | 42 | |

Ein spennandi greipa ...




SKIPALISTIN 2004

hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í *SKIPALISTANUM* er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.

***Skipalistin – hentur at hava!***

SKIPALISTIN 2004 kostar kr. 175,-
og innbundin kr. 240,-




JOHN DAM

er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hemara- og skeljaveiðu gekk hann ótráddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. *JOHN DAM* er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.

Bókin er innbundin
og kostar kr. 295,-

– Fæst í bókabúðunum

REPROZ